Tilmæli um tillagingar

# Endurskoðan av yrkisútbúgvingarøkinum

Yrkisútbúgvingarráðið

Útgáva 1.0

12. september 2018

# INNIHALD


1 Innleiðing og tilgongdin higartil ....3
1.1 Málsetningurin fyri arbeiðið ....3
1.2 Fortreytirnar arbeitt hevur verið undir ....4
1.3 Hvussu hevur verið arbeitt í 2018 ....4
1.4 Skipan av arbeiðinum og luttakarar ....5

2 Lærlingatalið - bakgrund ....6
2.1 Støðan/skipanin, sum hon er í dag ....6

3 Tilmæli um fast árligt lærlingatal ....9
3.1 Fortreytir ....9
3.2 Tilmæli ....9

4 Læru- og praktikkpláss innan tað almenna ....11
4.1 Føðsluhjálparar og føðsluatstøðarar ....11
4.2 Skrivstovulæra innan almenna fyrisiting ....11
4.3 Kt-frøðingar, v.m. ....11
4.4 Bólkur ....11
4.5 Tilmæli ....12

5 Tey sum ynskja yrkisútbúgvingarvegin, men ikki fáa lærupláss ....13
5.1 Støðan í dag ....13
5.2 Verandi tilboð - Kambsdalur ....15
5.3 Verandi tilboð - Glasir ....15
5.4 Tilmæli ....16
5.5 Bólkur ....17
5.6 Samanumtøka – tilmæli ....18

6 Endurskoðan av merkantilu yrkisútbúgvingunum ....19
6.1 Fokus ....19
6.2 Avbjóðingar á merkantila økinum ....19
6.3 Bólkur ....20
6.4 Kostnaðarmeting ....20
6.5 Tilmæli ....20
6.6 Ætlan fyri, hvussu arbeitt verður víðari ....21

7 EUX ....22
7.1 Hvat er ein EUX útbúgving ....22
7.2 Bygnaðurin í verandi lærlingaskipan ....22
7.3 Bygnaðurin í EUX lærlingaskipanini ....22
7.4 Málbólkurin ....23
7.5 Upptøka av EUX lærlingum ....23
7.6 Yrki sum byrja EUX ....24
7.7 Bólkur ....24

7.8 Kostnaðarmeting ... 25
7.9 Tilmæli ... 25

8 Lærlingaskipanin ... 27
8.1 Støðan í dag ... 27
8.2 Fráfall ... 28
8.3 Bólkur ... 29
8.4 Tilmæli ... 29
8.5 Kostnaðarmeting ... 30
8.6 Úrslit av broytingini ... 30

9 Kunning um yrkisútbúgvingar ... 31
9.1 Bólkur ... 31
9.2 Bólkurin hevur viðgjørt ... 31
9.3 Hvørji marknaðarføringsátøk til frama fyri yrksiútbúgvingar eru í dag ... 32
9.4 Nøkur tilmæli ... 32
9.5 Dømi um kalendara ... 32
9.6 Niðurstøða ... 32

10 Hvør er vinningurin av at broyta yrkisútbúgvingarskipanina? ... 33

# 1 INNLEIÐING OG TILGONGDIN HIGARTIL[1]

Rigmor Dam, landsstýriskvinna, legði á fundi á Tekniska skúla í Klaksvík 19. mai 2016 uppgávuna at endurskoða yrkisútbúgvingarskipanina til Yrkisútbúgvingarráðið (YÚR) at avgreiða.

Tá varð arbeiðið eisini byrjað á arbeiðsdøgum, har vinnu- og fakfelagsumboðini í Yrkisútbúgvingarráðnum, yrkisskúlar, MMR og Yrkisdepilin luttóku.

Niðurstøðan frá arbeiðsdøgunum var, at serliga skuldi arbeiðast við 5 viðurskiftum:

1. **Kunning**
   Betri kunning eigur at vera í framhaldsdeildini, og eigur hon at vera í eygnahædd, samstundis sum vinnan og lærlingar veita kunning um yrkisútbúgvingarskipanina. Skipað eigur at vera fyri skúlavitjanum, og lestrarvegleiðingin eigur at vera gearað til yrkisútbúgvingar. Samstundis eigur at vera kunnað í sosialum miðlum (facebook o.ø.), m.a. um hvørji tilboð og hvørjir møguleikar eru við eini yrkisútbúgving, umframt hvat hon kann brúkast til. Størri tign eigur at vera um yrkisútbúgvingarnar.
2. **Skúlaskeið – longd á skúlaskeiðum + upptøka**
   Í teknisku útbúgvingunum eigur upptøka at vera minst tvær ferðir árliga, samlaða vikutalið á 55 er í ordan. Men samansetingin av skúlaskeiðum eigur at gerast øðrvísi, t.d. 20+10+10+10+5. Harumframt eigur tað at vera møguligt at hava eitt støðisár á 40 vikur, har møguligt er at taka lærugreinir á gymnasialum stigi eisini.
3. **Almennar lærugreinir**
   Skilagott hevði verið, at lægru lærugreinastigini verða integrerað í yrkislærugreinarnar. T.v.s. at E – stig vera avtikin. Vit eiga at lata námsætlanirnar upp, samstundis sum læraraførleikin verður dagførdur. Depilsskipanin fer at gera tað møguligt at seta lærugreinirnar øðrvísi saman.
4. **Samskifti**
   Hildið verður, at ein nemingaætlan hevði verið skilagóð, men hon má ikki geva ov nógva umsiting hjá meistarunum, sum ikki ynskja eina slíka. Tí hon bæði kann vera umsitingarliga tung og kann vera skilt sum eftirlit. Møguleiki skuldi verið at gjørt eina royndarskipan. Annars varð mett, at yrkisskúlin skuldi bjóða meistaranum inn til eitt prát.
5. **Tilgongdin til yrkisútbúgvingarnar**
   Hildið varð, at skipanin virkar væl, tá tað er eitt stabilt tal av læruplássum og lærlingum. Ynskiligt er tí við eini konjunktur-útjavnandi skipan, har miðað verður eftir at gera eina avtalu millum tað almenna og vinnuna um eina støðuga tilgongd av lærlingum.

Vinnan og skúlarnir løgdu fram uppskot um, at seta í verk punkt 2, men landsstýriskvinnan tók avgerð um, at ein heildarætlan skuldi gerast fyri øll viðurskiftini.

Síðan hevur verið arbeitt víðari og nøkur mál eru komin afturat, sum liður í arbeiðinum, ið Yrkisútbúgvingarráðið hevur gjørt/staðið fyri.

## 1.1 MÁLSETNINGURIN FYRI ARBEIÐIÐ

Ein konjunkturútjavnandi skipan verður gjørd, sum fer at føra til eitt støðugt lærlingatal. Hetta fer at gera yrkisútbúgvingarskipanina lættari at umsita og góðskustøði støðugari. Talan er og verður um eina

[1] Punkt 1.1 er tikið orðarætt tikið úr frágreiðing, sum var gjørd eftir fundin í Klaksvík 19. mai 2016

reina lærlingaskipan við fokus á ta góðu veksliskipan ímillum skúla og meistaralæru, sum er í dag. Onnur runda av endurskoðanini hevur verið gjørd á heysti 2018.

## 1.2 FORTREYTIRNAR ARBEITT HEVUR VERIÐ UNDIR

Broytingaruppskotini fylgja verandi skúlaskipan og tankanum um EQF/NQF'in.




Ávís økir, sum hava verið viðgjørd, liggja partvíst uttanfyri yrkisútbúgvingarøkið, men hava verið tikin við, til tess at tryggja, at samband er ímillum ymisku liðini, sum eru partar í einum heildartilboði – t.d. tá kemur kunning/marknaðarføring um og av yrkisútbúgvingum, har hava miðnámsskúlar, vinna, fólkaskúlar, Mentamálaráðið og Yrkisdepilin øll ein leiklut.

Allar tillagingarnar, sum mælt verður til, verða gjørdar í yrkisútbúgvingarskipanini, skulu verða gjørdar innanfyri karmarnar, sum tryggja, at føroysku yrkisútbúgvingarnar framvegis eru góðkendar í hinum norðurlondunum.

## 1.3 HVUSSU HEVUR VERIÐ ARBEITT Í 2018

Yrkisútbúgvingarráðið hevur mannað 7 bólkar við fólki úr yrkisútbúgvingarráðnum, umframt við umboðum úr teirra baklandi. Ímillum 4 og 9 fólk hava mannað hvønn bólk. Allir limir í yrkisútbúgvingarráðnum høvdu møguleika at koma í allar bólkar ella velja umboð úr teirra baklandi at manna bólkarnar. Uppgávurnar hjá bólkunum hava verið hesar:

1. Fast árligt lærlingatal – hvat kundi tað verið og hví, hvussu skuldi tað verið umsitið og fylgt upp?
2. Læru og praktikkpláss innan tað almenna. Læruplássini innan tað almenna eru ov fá og fækkast. Í hvørjum yrkjum hevur tað almenna ein leiklut og hvussu kunnu fleiri læurupláss fáast í almenna geiranum?
3. Útbúgvingartilboð til teirra, sum ynskja eina yrkisútbúgvingarleið, men sum ikki fáa lærusáttmála. Hvussu stórur er hesin bólkur, hvat eyðkennir hann og hvussu kundi hetta verið loyst?
4. Endurskoða merkantilu útbúgvingarnar – er tørvur á broyting ella dagføring fyri at passa betur til vinnu- og samfelagstørvin?
5. EUX - gera uppskot um eina føroyska skipan til teirra, sum ynskja almennu fakini á einum støði, ið gevur atgongd víðari í útbúgvingarskipanini, t.v.s. sum bæði ynskja eina yrkisútbúgving og eina gymnasiala útbúgving
6. Endurskoða lærlingaskipanina – fak-innihald og støði, bygnað, býtið millum læru og skúla, longd av skúlaskeiðum og upptøku, o.s.fr.

7. Kunning og marknaðarføring av yrkisútbúgvingunum. Ætlan skal gerast fyri, hvussu yrkisútbúgvingar verða marknaðarførdar og lýstar á ein hátt, so tær eru sjónligar og áhugaverdar/lokkandi hjá ungdóminum og øðrum, sum kunnu hugsast at velja yrkisútbúgvingarleiðina. Hvussu gerst umdømið so gott sum gjørligt, og kunningin so eftirfarandi sum gjørligt.

Bólkarnir hava arbeitt intensivt eftir summarfrítíðina 2018 og eru í flestu førum komnir fram til ítøkilig tilmæli. Í øðrum føri er tilmæli, um mett verður, at arbeiðast skal víðari við málinum.

## 1.4 SKIPAN AV ARBEIÐINUM OG LUTTAKARAR

Formaðurin og skrivarin í Yrkisútbúgvingarráðnum leiddu tilgongdina fram til at bólkarnir fóru í gongd við sítt arbeiði. Skrivarin í Yrkisútbúgvingarráðnum hevur síðan fylgt arbeiðinum við at luttaka í fundunum hjá øllum bólkum. Skrivarar vórðu settir í bólkunum, og miða var ímóti, at limir í Yrkisútbúgvingarráðnum vóru skrivarar, fyri at arbeiðið skuldi verða gróðurfest í Yrkisútbúgvingarráðnum. Bert í tí eina bólkinum gav hetta ikki meining.

Yrkisútbúgvingarráðið hevur verið umboðað í bólkunum í so stóran mun sum gjørligt. Eisini hava limirnir í YÚR havt møguleika at fingið umboð frá teirra baklandi inn í bólkarnar, har tey hava mett tað gagnligt. Hetta hevur gagnað arbeiðinum og ført til, at málið í ávísum førum er blivið betur lýst, nýggj sjónarmið eru komin fram og avgerðargrundarlagið tí blivið betri.

## 2 LÆRLINGATALIÐ - BAKGRUND

Í dag sveiggjar lærlingatalið við konjunkturunum. Ynski er frá landsstýriskvinnuni um, at arbeitt verður fram ímóti eini skipan við støðugari lærlingatali, sum kann virka konjunktur-útjavnandi.

Endamálið í hesari fasuni hevur tí verið at venda spurninginum, hvussu skipanin er í dag og hvussu hon kundi verið broytt at náa einum støðugum lærlingatali. Arbeiðsgevarar og land hava bæði ein leiklut í hesari tilgongdini. Í bólkinum hava verið Marius Thomassen (skrivari) umboðandi Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Handilsvinnufelagið og nevndarlimur í Yrkisútbúgvingarráðnum, Jens Kristian Haraldsen, Føroya Handverksmeistarafelag, Jeffri Olsen, Glasir og Randi Frederiksberg frá Yrkisdeplinum.

### 2.1 STØÐAN/SKIPANIN, SUM HON ER Í DAG

Í talvuni niðanfyri sæst, at talið av nýggjum árligum lærusáttmálum síðan aldaskiftið hevur ligið beint omanfyri 267 í miðal. Verða bestu og slakastu árini trekt frá, áðrenn miðaltalið verður roknað, liggur miðal ímillum 260 og 263 nýggir lærlingar árliga.

**Miðal lærlingatalið roknað á ymiskan hátt 2001-2017** Talva 1

| Byrja | Lærlingar |
|---|---|
| 2001 | 129 |
| 2002 | 177 |
| 2003 | 214 |
| 2004 | 210 |
| 2005 | 242 |
| 2006 | 408 |
| 2007 | 416 |
| 2008 | 328 |
| 2009 | 173 |
| 2010 | 225 |
| 2011 | 248 |
| 2012 | 243 |
| 2013 | 291 |
| 2014 | 277 |
| 2015 | 289 |
| 2016 | 318 |
| 2017 | 360 |
| **Øll árini** | **4.548** |
| **Miðal** | **268** |

Árini raðfest eftir talið av lærlingaupptøkum

| Byrja | Lærlingar | | |
|---|---|---|---|
| 2001 | | | |
| 2009 | | | |
| 2002 | 177 | | |
| 2004 | 210 | | |
| 2003 | 214 | 214 | |
| 2010 | 225 | 225 | |
| 2005 | 242 | 242 | 242 |
| 2012 | 243 | 243 | 243 |
| 2011 | 248 | 248 | 248 |
| 2014 | 277 | 277 | 277 |
| 2015 | 289 | 289 | 289 |
| 2013 | 291 | 291 | |
| 2016 | 318 | 318 | |
| 2008 | 328 | | |
| 2017 | 360 | | |
| 2006 | | | |
| 2007 | | | |
| **Øll árini** | **3.422** | **2.347** | **1.299** |
| **Miðal** | **263** | **261** | **260** |

Kelda: Yrkisdepilin

**Lærlingatilgongdin frá 2001 til 2017 við trendi** Mynd 2




Kelda: Yrkisdepilin

Grafurin omanfyri vísir, at lærlingatalið sveiggjar, alt eftir støðuni í samfelagsbúskapinum. Frá einum lágum lærlingatali á eitt nú 129 í 2001 og 173 í 2009, til 416 í 2007 og 360 í 2017. Tað er hetta landsstýriskvinnan hevur ynski um skal broytast.

Grafurin vísir eisini, at talið av nýggjum sáttmálum hækkar støðugt ígjøgnum árini, hóast sveiggj eru.

Mynd 3 vísir, hvussu samanhangurin er ímillum nýggjar lærusáttmálar og íløgurnar hjá landinum. Burtursæð frá ávísum árum, so fylgir talið av nýggjum lærusáttmálum almennu íløgunum.

**Íløgur hjá tí almenna og lærlingasáttmálar 2003 til 2017** Mynd 3

Almennar íløgur á vinstra aksa og lærlingaupptøkur á høgra aksa




Viðm.: Tað almenna fenvir um almenna fyrisiting og tænastu (land, kommur, rikisfyrisiting og sosialar grunnar) og almennar fyritøkur, ið eru allar almennar eindir, ið framleiða á marknaði. Almenn íløga fevnir um útreiðslur í samband við nýbygging, umframt keyp av flutningstólum, maskinum, software og innbúgv vm.

Kelda: Hagstova Føroya (íløgur fyri landskassa, kommunur og sosialar grunnar), Búskaparráðið (íløgur fyri almennar fyritøkur) og Yrkisdepilin (lærlingasáttmálar)

**Almennar íløgur og lærlingatilgongdin, 2003 til 2017 (indekstøl, 2003=10(** Mynd 4




Viðm.: Tað almenna fenvir um almenna fyrisiting og tænastu (land, kommur, rikisfyrisiting og sosialar grunnar) og almennar fyritøkur, ið eru allar almennar eindir, ið framleiða á marknaði. Almenn íløga fevnir um útreiðslur í samband við nýbygging, umframt keyp av flutningstólum, maskinum, software og innbúgv vm.

Kelda: Hagstova Føroya (íløgur fyri landskassa, kommunur og sosialar grunnar), Búskaparráðið (íløgur fyri almennar fyritøkur) og Yrkisdepilin (lærlingasáttmálar)

Mynd 4 omanfyri vísir, at undantikið árini 2006 og 2007, tá vinnan setti lutfalsliga nógvar lærlingar, fylgjast íløgurnar hjá tí almenna og tilgongdin av nýggjum lærlingum rættiliga neyvt.

Eisini myndin niðanfyri vísir, at talið av nýggjum lærusáttmálum fylgir væl almennu íløgunum. Í miðal eru almennu íløgurnar pr. nýggjan lærusáttmála 5,2 mió. kr.

**Almennar íløgur í miðal roknaðar pr. nýggjan lærusáttmál 2003 til 2017** Mynd 5




Viðm.: Tað almenna fenvir um almenna fyrisiting og tænastu (land, kommur, rikisfyrisiting og sosialar grunnar) og almennar fyritøkur, ið eru allar almennar eindir, ið framleiða á marknaði. Almenn íløga fevnir um útreiðslur í samband við nýbygging, umframt keyp av flutningstólum, maskinum, software og innbúgv vm.

Kelda: Hagstova Føroya (íløgur fyri landskassa, kommunur og sosialar grunnar), Búskaparráðið (íløgur fyri almennar fyritøkur) og Yrkisdepilin (lærlingasáttmálar)

Neyðugt er eisini at greina tølini nærri yvir hvørjir lærlingar eru fyri hvørt øki. M.a. er langtíðar miðal av lærlingum, sum eru settir eftir handverkarasáttmálanum 176 lærlingar.

# 3 TILMÆLI UM FAST ÁRLIGT LÆRLINGATAL

Ein bólkur hevur viðgjørt ymisk viðurskifti um, hvussu arbeiðast kann innleiðandi við at koma fram til eitt fast árligt næmingatal.

- Jens Kristian Haraldsen
- Marius Thomassen, skrivari
- Jeffri Olsen
- Randi Frederiksberg

## 3.1 FORTREYTIR

- Avtala verður gjørd ímillum arbeiðsgevarar og landið um fast lærlingatal
- Land og kommunur mugu gera langtíðaríløguætlanir
- Landið setur eina peningaupphædd av, sum verður gjørd í byggiíløgur í lágkonjunkturi (t.d. viðlíkahald)
- Avtalast skal, hvussu langt áramál hvør avtala skal strekkja seg yvir
- Lærlingatalið fylgir íløgunum í byggiverkætlanir, soleiðis at tá íløgurnar eru so og so nógvar í byggiverkætlanir, skal lærlingatalið vera so og so høgt. Samsvar ímillum íløgur í byggiverkætlanir og lærlingatal
- Neyðugt við breiðum útboði av yrkisútbúgvingum
- Tryggjast má, at ov smáir flokkar ikki forða fyri upptøku av lærlingum
- Afturberingin av lønarútreiðslunum verður 100% í skúlatíðini
- Avtala verður gjørd millum partarnar um, hvussu skipanin skal síggja út, eins og hvussu hon verður umsitin og hvør ger tað
- Avtalast skal nærri, hvørji amboð verða brúkt til at regulera, alt eftir, um tíðirnar eru ringar ella góðar (t.d. viðlíkahald av almennum bygningum)
- Eitt forum verður uppræ ttað, har báðir partar hittast regluliga
- Neyðugt verður at hava eina ætlan fyri, hvussu man fyriheldur seg, tá búskaparlig afturstig koma

## 3.2 TILMÆLI

- Forum verður gjørt, har partarnir møtast og avtala, hvussu víðari verður farið fram, til tess at avtala kann gerast um fast árligt lærlingatal
- Eftirfylgjandi verður eitt forum gjørt, sum skal viðlíkahalda avtaluna, sum komið verður fram til. Eitt tílíkt forum kundi verið samansett av:
  - Tað almenna: Aðalstjórar, Fíggjarmálaráðið, Kommunur
  - Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Handilsvinnufelagið
  - Yrkisdepilin er neutralur skrivari í hesum forum

**Dømi um forum at umsita avtalu íml. land/kommunur og arbeiðsgevarar um fast árligt lærlingatal**

Mynd 6




Kelda: Egin uppseting

Arbeiðið í forum

- Gera metingar um lærlingatørv í mun til serstaku vinnugreinarnar
- Meta um og tilmæla neyðugar og bráneyðugar viðlíkahaldsíløgur
- Áseta árligt lærlingatal

# 4 LÆRU- OG PRAKTIKKPLÁSS INNAN TAÐ ALMENNA

Ábyrgdina av uppgávuni at halda eitt støðugt høgt lærlingatal eiga bæði tað almenna og tað privata. Ein partur er longu umrøddur í tilmælinum um, hvussu náast kann fram til at eitt fast árligt lærlingatal verður ásett í avtalu ímillum privata og almenna geiran, men eisini tað almenna eigur sín leiklut í at útbúgva lærlingar innan økir, sum tað almenna varðar av.

Tað almenna kann hava lærlingar í ymiskum yrkjum, har tað mest vanliga er skrivstovulæran í almennari umsiting. Harafturat útbúgva vit føðsluatstøðingar (assistentar) og føðsluhjálparar, sum einamest verða útbúnir til almenna geiran at arbeiða á barnagørðum/vøggustovum, ellisheimum og eldrasambýlum, sjúkrahúsum, almennum kantinum, o.s.fr.

## 4.1 FØÐSLUHJÁLPARAR OG FØÐSLUATSTØÐARAR

Tá ein lærlingur søkir inn á Tekniska Skúlan í Klaksvík (TSK), er fyrsta hálva árið eitt grundskeið. Síðan velur næmingurin, um hann ynskir at gerast kokkur/gastronom ella føðsluatstøðingur/ernæringsassistent. Munurin ímillum útbúgvingarnar er rættiliga stórur. Kokkar gera mat, sum flest okkara bert eta, tá vit fara á matstovu onkuntíð av og á. Tí verður hugsað minni um, hvussu heilsugóður maturin er – tað snýr seg um eitt gott matupplivilsi og tí er ongin avmarking eitt nú tá tað kemur til smør og róma. Føðsluatstøðingarnir, hin vegin, skulu umframt at hugsa um matupplivilsi taka atlit til, at kosturin er heilsugóður og livir upp til internationalu føðslutilráðingarnar. Føðsluatstøðingar hava eitt gott innlit í, hvussu matur ávirkar fólk – hvat verður tilrátt og frárátt, alt eftir, hvussu heilsustøðan hjá fólki er. Fólk, sum hvønn dag eta kost frá einum føðslufrøðingi hava tí stóra gleði av, at kosturin í longdini førir til eina góða heilsu.

Til tess at gerast útbúgvin føðsluhjálpari ella føðsluatstøðingur krevst, at til ber at koma í starvsvenjing/fáa lærusáttmála. Avbjóðingin í verandi støðu er, at bert 3 arbeiðspláss innan tað almenna eru skrásett at hava læruplássgóðkenning, sum bendir á, at bert hesi 3 taka inn lærlingar og eru við til at útbúgva føðsluhjálparar og føðsluatstøðingar.

Ein avleiðing er, at næmingar, sum ynskja at gerast føðsluatstøðingar ella føðsluhjálparar, velja at gerast kokkar, til tess at fáa lærupláss og fáa yrkisbræv. Vit hava tí alt ov fáar føðslufrøðingar í Føroyum, í mun til tørvin.

## 4.2 SKRIVSTOVULÆRA INNAN ALMENNA FYRISITING

Tað almenna hevur verið við til at útbúgva fólk til at taka sær av skrivstovuhaldi innan almenna fyrisiting. Parturin hjá tí almenna í at útbúgva fólk í skrivstovulæru er tó alsamt fallin seinastu árini og er nú umleið 25% av øllum lærlingunum í skrivstovulæru. Verður hugt at øllum merkantila økinum, eru bert 10% av øllum lærlingum, sum verða útbúgvin innan almenna geiran.

## 4.3 KT-FRØÐINGAR, V.M.

Tað almenna brúkar eisini aðrar tænastur, har til ber at hava lærlingar. Eitt nú kt-supportarin. Eisini her átti tað almenna at tikið inn lærlingar. Hetta er samstundis ein útbúgving, sum vinnan í stóran mun eftirspyr.

## 4.4 BÓLKUR

- Randi Frederiksberg
- Magnus Norðberg, skrivari

## 4.5 TILMÆLI

- Á sama hátt, sum privati geirin ger avtalu um eitt støðugt lærlingatal, eigur almenni geirin at gera avtalu um støðugt lærlingatal á økjum, har tað almenna er við til at útbúgva sveinar
- Greining eigur at vera gjørd av, á hvørjum økjum tað almenna kann útbúgva lærlingar og síðan eigur eitt fast lærlingatal at verða ásett
- Tað almenna eigur at áseta mál fyri, hvussu nógvir lærlingar skulu útbúgvast sum føðsluatstøðingar, føðsluhjálparar, kt-supportarar, skrivstovufólk, o.s.fr.

# 5 TEY SUM YNSKJA YRKISÚTBÚGVINGARVEGIN, MEN IKKI FÁA LÆRUPLÁSS

Spurningurin er, hvør hesin bólkurin er og hvussu stórur hann er. Tí var innleiðandi arbeiði at greina tølini fyri tey, sum søkja inn á yrkiútbúgivingarvegin, tey sum fella frá á vegnum ígjøgnum Yrkisnám 1 og Yrkisnám 2 og at greina, hvussu gongst teimum, sum gerast liðug við Yrkisnám 2[2] uttan at hava fingið lærusáttmála.

## 5.1 STØÐAN Í DAG

Inngongdirnar til yrkisútbúgvingar eru tvær:

- til ber at søkja inn á skúla, fara í skúla og síðan fáa avtalu við arbeiðsgevara um sáttmála ímeðan ein gongur í skúla, ella
- til ber at undirskriva lærusáttmála, byrja í læru og síðan, tá eitt skúlaskeið byrjar, fara í skúla í Føroyum ella uttanlands, alt eftir hvør útbúgving talan er um

Um hugt verður at upptøkuni á yrkisskúlar sæst, at so gott um øll, ið søkja, koma inn. Ongi upptøkukrøv eru til næmingar, sum søkja inn á yrkisnám.

Einans maskin-, hárfríðkanar- og matvøruútbúgvingin hava avbjóðingar við ov nógvum umsóknum í mun til kapasitet[3].

Tey, sum leita sær inn á yrkisútbúgvingarleiðina við at søkja inn á skúla, hava síðan, um tey ikki hava fingið lærupláss, áðrenn YN1 á 20 vikur er runnið, møguleika at halda fram á YN2 á 20 vikur. Tá næmingurin hevur lokið YN2, hevur hann sostatt gingið í skúla í 1 ár.

Niðanfyri sæst eitt yvirlit frá Glasi og TSK yvir, hvussu nógv av teimum, sum hava tikið YN2, ikki hava fingið sáttmála, tá skeiðið endar[4]. Talvan vísir eisini, hvussu nógv hava fingið lærusáttmála árini síðan at tey vórðu liðug við YN2.

**Tal av næmingum, sum ikki hava fingið sáttmála eftir at hava lokið YN2 - Glasir** Talva 2

| | 2015 | | 2016 | | 2017 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | YN2 | Einki lærupláss | YN2 | Einki lærupláss | YN2 | Einki lærupláss |
| Bil | 1 | 1 | 0 | 0 | 3 | 3 |
| El | 27 | 9 | 20 | 18 | 27 | 19 |
| Y4-El | 12 | 10 | 0 | 0 | 4 | 1 |
| Hár | 21 | 13 | 18 | 13 | 17 | 10 |
| Húsasmiðir | 17 | 6 | 9 | 4 | 7 | 2 |
| Maskinsmiðir | 9 | 5 | 5 | 3 | 4 | 3 |
| Y4-maskin | 10 | 2 | 0 | 0 | 5 | 5 |
| **Samanlagt pr. ár** | **97** | **46** | **52** | **38** | **67** | **43** |

Kelda: Glasir

[2] Heitini "skúlaskeið" og "Yrkisnám (YN)" verða bæði brúkt í hesum skjalinum um skúlagongdina. 1. og 2. Skúlaskeið verða eisini kallað Yrkisnám 1 (YN1) og Yrkisnám 2 (YN2)

[3] Innan hárfríðkanar- og matvøruútbúgvingarnar er eisini ein avbjóðing, at lærureplássini eru munandi færri í mun talið av næmingaum, sum skúlin tekur inn á hvørjum ári. Tað almenna eigur í stóran mun praktikkplássini innan matvøru. Ein annar bólkur í endurskoðanararbeiðinum viðger, hvussu útboðið av almennum praktikkplássum kann økjast.

[4] Bert næmingar uttan lærusáttmála tá skúlaskeiðið er lokið, eru taldir við í YN2

**Tal av næmingum, sum ikki hava fingið sáttmála eftir at hava lokið YN2 - Tekniski skúlin í Klaksvík** Talva 3

| | 2017 | |
|---|---|---|
| | YN2 | Einki læurupláss |
| Timbur | 3 | 0 |
| El | 9 | 4 |
| Maskin | 3 | 0 |
| **Samanlagt pr. ár** | **15** | **4** |

Kelda: Tekniski skúlin í Klaksvík

Ongin greining er av, hví tey seinastu frá eitt nú 2015, ikki fáa sáttmála. Sum sæst á talvuni er tað bert ein lítil partur av samlaðu næmingunum, sum framvegis ikki hava fingið sáttmála eina tíð eftir at tey eru liðug við YN2 – serliga um sæð verður burtur frá næmingum á El- og Hárfríðkanardeildini, sum báðar taka nógvar næmingar inn á skúlan í mun til, hvussu nógv lærupláss eru og hvussu stórur marknaðurin er.

Umboðini frá skúlunum halda, at orsøkin til at nøkur ikki fáa sáttmála líka nógv skyldast, at hesi ikki ynskja sáttmála. Fleiri næmingar taka hetta árið fyri at finna útav, hvørja yrkisleið tey ynskja og hava síðan staðfest, at tey ikki ynskja at fara yrkisútbúgvingarleiðina. Skúlarnir meta, at trupulleikin við fólki, sum ynskja, men ikki fáa sáttmála eftir at hava lokið YN2, er ógvuliga lítil ella als ongin. Tey flestu fáa lærupláss innan 3 ár, og onnur velja eina aðra leið. Í løtuni er hákonjunkturur og tað er ivaleyst viðvirkandi til, at tølini síggja út, sum tey gera. Hin vegin, endamálið við at arbeiða fram ímóti at fáa í lag eina konjunkturútjavnandi skipan, er at tryggja, at lágkonjunkturar ikki raka so harðliga, sum vit hava roynt tvær ferðir seinastu umleið 25 árini.

Tølini innan merkantila øki vísa, at nógv ung taka eina 3 ára langa miðnámsútbúgving, áðrenn tey fara í yrkisnám. Á tekniska økinum (uttan hárfríðkarar) eru nógv færri, sum hava lokið aðra miðnámsútbúgving, men eisini har gerast tey alsamt fleiri.

**Útbúgvingarliga bakgrundin hjá lærlingum í læru innan Handil og sølu** Mynd 7




Kelda: Yrkisdepilin




Bólkurin heldur, at vantandi kunningin um ymsu valmøguleikarnar í samband við mið- og yrkisnám ger, at nógv ung í dag taka óneyðuga skúlagongd, av tí tey seinni skifta yrkisleið. Hetta hendir t.d. tá ung fyrst nema sær eina 3-ára miðnámsútbúgving, fyri síðan at nema sær eina yrkisútbúgving. Fyrsta útbúgvingin gevur ávísa stytting í lærutíðini, men ikki fult. Hesi tølini vísa, at fleiri sum velja gymnasialt miðnám hava valt skeivu útbúgvingina og tey skifta síðan frá einari gymnasialari útbúgving til eina yrkisútbúgving. Tøl finnast ikki fyri, hvussu nógv fara øvutan veg ella hvussu nógv yrkislærd seinni fara víðari í útbúgvingarskipanini, men hetta hendir heilt víst eisini, um enn í minni mun.

## 5.2 VERANDI TILBOÐ - KAMBSDALUR

**Longd lestrartíð**. Ein møguleiki, sum verandi skipan longur hevur, er at leingja um lestrartíðina. T.d. á FHS og á fyrireikingarbreytini (fyrrverandi HF) verður hetta brúkt, tá næmingum av ymiskum orsøkum tørvar longda lestrartíð. Hetta er ein rættiliga stirvin skipan bæði fakliga og námsfrøðiliga og er ikki eins inkluderandi og vanliga skipanin. Hon er helst best egnað til næmingar, ið vegna sosialar umstøður ella úrvalsvirksemi brúka longri tíð enn vanligt til skúlagongdina.

**OCN skipanin.** OCN (open college network) er ein førleikametingarskipan, sum metir um ítøkiligar førleikar hjá tí einstaka og veitir prógv fyri hesar førleikar. Skipanin verður brúkt í ymiskum høpum í eitt nú Svøríki, Onglandi og Danmark, m.a. fyri at prógva yrkisførleikar, sum eru tilognaðir á verkstaðsskúlum, ungdómsskúlum, vinnupraktikk o.s.fr. Í Føroyum verður skipanin brúkt á serbreytunum á miðnámsskúlunum og hevur virkað væl. Ein møguleiki at røkka ungdómum, sum ikki megna eina fullfíggjaða yrkisútbúgving, kundi verið at víðka OCN í Føroyum. Hetta er ein góður møguleiki hjá skúlum og vinnu at samstarva um at menna nakrar ítøkiligar og viðkomandi førleikar eftir tørvi hjá vinnuni og tí einstaka.

## 5.3 VERANDI TILBOÐ - GLASIR

Í august 2013 bjóðaði Føroya Handilsskúli (FH) eitt øðrvísi tilboð til næmingar, sum ikki vóru klárir til miðnám, ella ikki sluppu inn á nakra miðnámsútbúgving. Næmingar fingu tilboð um at taka eitt-ára FHS útbúgvingina eftir tveimum árum. Hetta varð gjørt í samráð við Mentamálaráðið. Í 2014 varð sama tilboð givið næmingum, ið høvdu sama tørv.

Við royndunum frá 2013 og 2014 varð hetta tilboð bjóðað út aftur í 2015, og hesaferð var talan um eitt árs fyrireiking til FHS, kallað Miðnám Fyrireiking (MF). Í samráð við MMR varð hetta tilboð bjóðað út aftur í 2016, men við nakað øðrvísi tilgongd enn undanfarnu ár.

Endamálið við MF er at fyrireika næmingar, sum ikki lúka neyðugu krøvini, til eina miðnámsútbúgving. Talan kann eisini vera um næmingar, sum ikki hava nøktandi próvtøl frá 9./10.flokki ella hava sosialar ella aðrar avbjóðingar í verandi løtu og hava tørv á einum ári til fyrireiking í tryggum umhvørvi.

Flestu næmingar eru innan "grázonuøkið". T.v.s. ikki hava nøktandi fólkaskúlagongd/prógv, ella ynskja at "venja seg til at ganga í skúla aftur" og síggja møguleika til tess í hesum fyrireikingarárinum. Næmingarnir hava føroyskt, enskt, støddfrøði, alisfrøði, danskt og samfelagsfrøði á E støði og enda við próvtøku. MF er eitt ár.

Undirvísingin skal í mesta mun spegla veruleikan uttanfyri skúlan. Við hesum meina vit, at motivatiónin helst er størri fyri hesar næmingar, ið sum heild ikki eru komnir væl gjøgnum fólkaskúlan og í fleiri førum hava mist motivatiónina fyri at læra - ella trúnna uppá egnu styrkir. Motivatión er tí eitt stórt evni í undirvísingini. Fyri at tryggja ta góðu relatiónina við næmingin, eru næmingasamrøður ein sjálvfylgja í undirvísingini.

**Tørvurin í dag.** Mett verður at ein málbólkur, sum í dag hevur tað trupult eru tey, ið ikki megna eina fullfíggjaða læru ella skúlagongd beint eftir fólkaskúla, men við hollari venjing og vegleiðing væl megna at røkja ítøkiligar uppgávur á arbeiðsmarknaðinum ella við einari serstakari skúlagongd ígjøgnum eina tíð fáa førleikar og trúnna á, at tey kunnu taka eina útbúgving.

Hvussu stórur hesin bólkur er, er trupult at siga, tí hann er neyvan eins sjónligur, sum aðrir bólkar. Við støðið í eini leysligari meting frá skúlunum, er hesin bólkurin á 10-15 næmingar á Kambsdali, 15-20 næmingar á Glasi og 10-15 næmingar á Tekniska skúla í Klaksvík.

Síðan tilboðið um FHS á Dugna við Áir varð steðga, er hesin bólkurin blivin sjónligari á vanligu miðnámsskúlunum. Eisini hevur ein broyttur arbeiðsmarknaður helst broytt fortreytirnar, so hesin málbólkurin ikki hevur líka lætt at finna starv sum áður.

Mælt verður til, at ein serstakur bólkur verður settur at greina hendan spurningin nærri og samstundis gera ítøkiligt uppskot um, hvussu ein skipan kundi verið bygd upp, sum tekur hond um hendan málbólkin á ein skynsaman hátt.

## 5.4 TILMÆLI

**Kunning:** Skipanin og kunningin má broytast soleiðis, at tey ungu skjótari finna røttu útbúgvingar- og/ella starvsleiðina. Hetta vil spara útreiðslur til útbúgvingarøkið, umframt at tað vil leysgeva kapacietet í skúlunum, soleiðis at tað gerst lættari hjá øllum at sleppa inn, eins og tað gevur rúm fyri eini umskipan, sum kann geva størri útbúgvingartilboð. Tí kapaciteturin í skúlunum sær í dag út til at vera nøktandi í mun til støddina av árgangum.

**Fyrireikingarár (½ ár):** Vit mæla til, at eitt hálvt árs fyrireikingarár/støðisár verður upprættað innan yrkisútbúgvingarøkið, har ung fáa møguleikan at fáa innlit í ymiskar yrkisgreinar, sum eru í Føroyum. Eftir 20 vikur við breiðari kunning um yrkisútbúgvingarøkið, kann næmingurin antin velja at gevast á skúlanum og velja sær annan yrkisveg, ella hann kann velja seg inn á tann yrkisútbúgvingarvegin honum listir og taka YN1 innan valda yrkið, samstundis sum hann leitar sær lærupláss.

Hetta tilboðið vil geva nógvum ungum ein førleika innan handverk, sum tey í dag ikki fáa aðrastaðni og sum tey hava gleði av ígjøgnum lívið, hóast tey skuldi valt sær annan yrkisveg. Samstundis gevur tað ungum, sum ikki vita hvat ein yrkisútbúgving er, møguleika fyri at velja yrkisleið á betri grundarlagi.

Nú tíðin vísir, at fleiri ung síggja út til at velja yrkisútbúgvingarvegin, heldur bólkurin, at tað mest umráðandi er at fáa eitt størri útboð av yrkisútbúgvingum í Føroyum.

**Tørvsmeting:** Ein tørvsmeting eigur at verða gjørd í almenna og privata geiranum, har arbeiðsmarknaðurin sigur frá, hvør tørvurin á arbeiðsmegi/førleikum er. Yrkisdepilin fær javnan áheitanir frá almennum og privatum arbeiðsgevarum við ynski um, at nýggjar útbúgvingar verða settar á stovn.

**Nýggjar útbúgvingar:** Bæði privati og almenni geirin eru komin við áheitan um at fáa útbúgvingina til kt-supportara í Føroyum. Hendan útbúgvingin vendir sær eisini til ein bólk, sum vanliga telur ungar dreingir, ið duga væl við teldu, men møguliga ikki eru klárir til at fara til Danmarkar á skúla.

Regluliga fær Yrkisdepilin áheitanir við ynski um at nýggjar útbúgvingar, sum arbeiðsmarknaðurin hevur tørv á, eiga at verða settar á stovn. Her er bæði talan um nýggjar útbúgvingar, sum standast av einum broyttum arbeiðsmarknaði, men eisini um útbúgvingar, sum vinnan heldur fleiri ung høvdu valt, um útbúgvingin var í Føroyum.

Vit mæla til, at fleiri útbúgvingar verða settar á stovn í Føroyum, sum longu hava lærlingar á arbeiðsmarknaðinum, men í minni mun enn til at fylla eina skúlaflokk. Her kann nevnast byggismiðir, múrarar, málarar, snikkarar og líknandi. Á tann hátt fáa okkara ungu fleiri útbúgvingarmøguleikar, og vinnan fær tørvin á ymsu førleikunum nøktaðan. Hetta er eisini skynsamt fíggjarliga sæð, tí ein lærlingur kostar landinum munandi minni enn ein studentur.

**Serligt tilboð:** Vit hava eisini ein lítlan bólk av ungum fólki, sum av ymsum ávum ikki fara gymnasiala vegin og heldur ikki fara yrkisútbúgvingarvegin eftir at vera farin úr fólkaskúlanum. Nøkur hava ivaleyst eisini avbjóðing við at finna starv, serliga um eitt ávíst arbeiðisloysi er. Hesi hoyra ikki undir serskipanina hjá Almannaverkinum við at fáa tillagaðan lærusáttmála og heldur ikki til serbreytirnar í miðnámsskúlunum. Tað eigur at verða kannað nærri, hvussu stórur ein tílíkur bólkur er og síðan má ein ætlan gerast, sum eisini skapar tilboð til hesi. Arbeiðsgevarar eru komnir við tilboði um, at kann eitt lønarískoyti veitast, kunnu nøkur av hesum ungu koma út á arbeiðsplássini og fáa grundleggjandi upplæring í tí, sum verður arbeitt við á tí staðnum teir koma. Arbeiðast má tó víðari við, hvussu hetta kundi verið gjørt í praksis, øllum pørtunum til gagns. Arbeiðsgevarar vísa tó á, at hetta ikki er eitt breitt tilboð til ung, men bert til nøkur ung við serligum avbjóðingum av øðrum slag enn tey sum eru dekkað av øðrum verandi tilboðum.

## 5.5 BÓLKUR

- Elin Sørensen, Føroya Arbeiðarafelag, skrivari
- Steinfinn Jacobsen, Glasir
- Per Jacobsen, TSK
- Dávur Høgnason, Føroya Handverksmeistarafelag
- Petur Frank Joensen, Føroya Handverksmeistarafelag
- Marius Thomassen, Vinnuhúsið
- Eli Brimsvík, Havnar Handverkarafelag
- Randi Frederiksberg, Yrkisdepilin, eygleiðari

## 5.6 SAMANUMTØKA – TILMÆLI

- Økjaum kunningina til ung, so valið ímillum miðnáms- og yrkisútbúgving verður tikin á røttum grundarlag
- 20 vikur fyrireikingarskeið til yrkisnám (kostnaðarmeting er hjáløgd í 6. tilmæli)
- Tørvurin á førleikum á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum eigur at verða kannaður, so útbúgvingar kunnu gerast í samsvari við tørvin
- Nýggjar útbúgvingar eiga at verða gjørdar í tráð við tørvin á arbeiðsmarknaðinum
- Ein bólkur eigur at verða settur at greina greina tørvin á skúlatilboði til tey, sum fella uttanfyri verandi tilboð. Bólkurin skal gera ítøkiligt uppskot um, hvussu ein skipan kundi verið bygt upp, sum tekur hond um hendan málbólkin á ein skynsaman hátt
- Tilboð til ung við serligum avbjóðingum at koma inn á arbeiðsmarknaðin, sum ikki eru fevnd av verandi tilboðum. Arbeiðast skal víðari við at gera avtalu ímillum land og arbeiðsgevarar

# 6 ENDURSKOÐAN AV MERKANTILU YRKISÚTBÚGVINGUNUM

Merkantilu yrkisútbúgvingarnar í hesum tilmælinum fevna um privata skrivstovu all around, heilsølu og smásølu, umframt skrivstovuútbúgving í almennari fyrisiting. Merkantilir útbúgvingarprofilar sum krevja danska skúlagongd, eitt nú innan spedition, shipping og logistikk, eru ikki partar av hesum tilmælinum.

Ein lítil triðingur av teimum sum í dag fara undir eina yrkisútúgving taka eina merkantila yrkisútbúgving. Í 2017 vóru tað 102 av 366 lærlingum, ið fóru merkantila vegin. Sum útgangsstøði taka útbúgvingarnar 4 ár, men í flestu førum verður stytting givin vegna áður lokna gymnasiala útbúgving, t.d. búskaparbreyt, student ella FHS. Tey flestu læra sostatt millum 2 og 3 ár.

Merkantilu yrkisútbúgvingarnar hava ikki fylt stórvegis í almenna útbúgvingarkjakinum í mun til handverki og hava helst ikki fingið somu viðgerð sum tær teknisku yrkisútbúgvingarnar í skipanini sum heild. Tó hevur leingi verið ynski um, at seta á stovn skúlagongd innan almenna fyrisiting í Føroyum og var hetta spírin til, at hetta økið í síni heild nú verður endurskoðað.

Í stuttum kann sigast, at arbeiðsbólkurin er samdur um hvat eigur at vera endurskoða og viðgjørt, men bólkurin er ikki komin til endaligar niðurstøður um útbúgvingarbygna og innihald við tí stutta skotbrái ið var givið. Avbjóðingin er, at talan ikki er um eina útbúgving, men tríggjar rættuliga ymiskar útbúgvingar ið vera viðgjørdar samstundis.

## 6.1 FOKUS

Tríggir fundir hava verið, har tað í høvuðsheitum vóru hesir spurningar á skránni:

- Skulu vit hava skúlagongd innan almenna fyrisiting í Føroyum?
- Er støðið nøktandi í dag? Skal talan vera um víðari/hægri útbúgving/ar?
- Er innihaldið nøktandi og nóg spennandi? Førleikamál og lærugreinar?
- Er strukturin nøktandi? Er t.d. nóg nógv skúlagongd í mun til lærutíð?
- Kann talan vera um felags skúlagongd fyri almenna og privata skrivstovuútbúgving?

## 6.2 AVBJÓÐINGAR Á MERKANTILA ØKINUM

Fyrstu fundirnir snúðu seg einamest um útbúgvingarstig. Ikki slepst undan, at tey flestu hava eina miðnámsútbúgving áðrenn byrjað verður og at tað tískil kundi hugsast, at merkantilu útbúgvingarnar vóru á t.d. akademistigi. Bólkurin samdist tó um, at hetta ikki var rætti leisturin, í hvussu er ikki í fyrstu atløgu, serliga tí at ynski vóru frá fleiri pørtum um at varðveita útbúgvingarnar á einum praktiskum stigi ið leggur seg so tætt uppat arbeiðslívinum sum til ber. Harumframt var mett, at innihaldið kundi endurskoðast og gerast meiri spennandi og viðkomandi uttan at fara á akademi ella universitetsstig.

Skúlagongd innan almenna fyrisiting er ikki til í Føroyum á yrkisútbúgvingarstigi og hava fleiri eftirspurt henda møguleika í nógv ár. Í verandi støðu senda almennir stovnar sínar lærlingar til Danmarkar. Í hesum sambandi er ein ávís hoyring gjørd við almennar stovnar áður og var ein niðurstøða, at innihaldið á donsku skúlunum ikki var nóg viðkomandi, tá hugsað verður um føroysk samfelagsviðurskifti. Í hesum sambandi var hildið, at tað var ynskiligt at seta á stovn føroyska útbúgving, har føroysk viðurskiftir fylla mest.

Bólkurin umrøddi trupulleikan og kom ásamt um, at skúlagongdin eigur at vera skipað í Føroyum.

Harnæst umrøddi bólkurin serliga avbjóðingina við at fáa fleiri at velja hesar útbúgvingarmøguleikar. Víst var á, at fleiri fyritøkur høvdu trupult við at fáa lærlingar, serliga innan handilsøkið. Og harnæst

eru lærlingarnir ofta komnir væl áleiðis inn í 20ini áðrenn byrjað var at læra. Tí er tað ein stór avbjóðing at fáa útbúgvingarnar at gerast meiri attraktivar og viðkomandi og harvið røkka nýggjan málbólkum sum tær møguliga ikki gera í dag.

Í hesum sambandi er bólkurin tó samdur um, at neyðugt verður, at gera eina tørvskanning fyri at greina hvussu vit gera útbúgvingarnar meiri viðkomandi.

## 6.3 BÓLKUR

- Janus á Ryggi, Yrkisdepilin, skrivari
- Anna Johannesen, Starvsmannafelagið
- Olaf Absalonsen, Glasir
- Eyðvør Berg, Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Birita Johansen, Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Palma Petersen, S&K
- Bjarni Mortensen, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið
- Randi Frederiksberg, Yrkisdepilin, eygleiðari

## 6.4 KOSTNAÐARMETING

| | |
|---|---|
| Tørvskanning og fokusbólkar | 35.000 kr. |
| Fundir annars | 10.000 kr. |
| Námsskipanararbeiði, 3 námsskipanir | 60.000 kr. |
| Skúlagongd: | |
| Verður leisturin, at útbúgvingarnar skrivstova, smásøla og heilsøla og almenn fyrisiting verða 10 vikur av skúlagongd hvør, verður meirkostnaðurin í mun til verandi játtan mett at vera: | 400.000 kr. |
| Tilsamans | 505.000 kr. |

## 6.5 TILMÆLI

- Tørvskanning eigur at verður gjørd til tess at útgreina, um verandi útbúgvingar eru hóskandi í mun til førleikarnar, sum arbeiðsmarknaðurin eftirspyr. Í hesum sambandi eiga verandi lærugreinar, førleikamál og útbúgvingarbygnaður at verða endurskoðað
- Førleikamálini eiga at vera endurskoða og í nógv størri mun enn í dag at vera gjørd ítøkilig
- Útgreining eigur at vera gjørd av, hvussu útbúgvingarnar gerast meiri attraktivar. T.d. eigur at vera hugt eftir bæði fakheitum og innihaldið í hesum sambandi. Fyritøkur hava trupult við at fáa lærlingar, serliga innan heil- og smásølu og ofta eru lærlingar miðskeiðis í 20unum áðrenn teir gera lærusáttmála
- Hugt eigur at verða eftir um skúlagongdin skal leingjast, soleiðis at fleiri viðkomandi lærugreinar gerast partar av útbúgvingunum og sostatt gera útbúgvingina meira tíðarhóskandi og spennandi. Innan skrivstovu og handil eru eitt nú arbeiðsmarknaðurrættur, vinnulívsrættur og sølusálarfrøði nevnd sum møguligar lærugreinar
- Komandi útbúgvingarnar eiga allar at hava sama støðið, men skúlagongdin kann møguliga vera ymisk í longd og vavi alt eftir hvør tørvurin er
- Skúlaskeiðini eiga at vera meiri samansjóðað soleiðis, at lærlingarnir koma at arbeiða meiri hugsavnað við ávísum evnum samstundis og ikki so spjatt soleiðis sum støðan er í dag. Tá verður eisini léttari at arbeiða við verkætlanum

- Betri samband eigur at vera millum skúla, læurupláss og útbúgvingarinnihald. T.d. kundi ein leistur verið, at hvørt skúlaskeið vardi 1 mánað við ávísum evni og at lærlingurin síðani er á arbeiðsplássinum/læru 1 mánað har arbeitt verður við sama evninum. Eftir tað fer lærlingurin aftur í skúla. Soleiðis verður betri samanhangur ímillum teori og praksis
- Yrkisútbúgving í almennari fyrisiting eigur at vera skipað við skúlagongd í Føroyum. Uppskot til kunngerð fyriliggur og komandi árið eigur at verða arbeitt við at útgreina og staðfesta bygnað og innihald. Verandi kunngerðaruppskot skal tó eisini endurskoðast sum partur av hesum
- Eitt meiri liðiligt FHS eigur at vera umhugsað, soleiðis, at fleiri byrja í læru beinanvegin eftir fólkaskúlan. T.d. møguleikin at taka FHS á netinum. FHS er partur av útbúgvingunum í dag
- Treytin, at lærlingar við aðrari gymnasialari útbúgving enn búskaparbreyt og sum tí mangla ávísar FHS lærugreinar, skulu taka hesar í lærutíðini, eigur at vera endurskoðað
- Útbúgvingarprofilar innan heil- og smásøluútbúgvingina eiga at vera umhugsaðir. Her verður serliga hugsað um ”sølufólk” sum serligan profil. Orsøkin er, at nógvar fyritøkur hava fólk ið selja, eisini í samband við útflutning. Verandi kunngerð eigur at vera endurskoðað, soleiðis at leggjast kann upp fyri hesum. Eisini kann hetta vera við til at gera útbúgvingina meiri spennandi
- Møguleikin við EUX eigur at vera kannaður, um so er, at hesin kann draga fleiri fólk til útbúgvingarnar. Tó verður ikki mett, at hetta er átrokandi
- Hyggjast skal at, um FHS skipanin kann gerast smidligari, so hon í størri mun hóskar til tørvin

## 6.6 ÆTLAN FYRI, HVUSSU ARBEITT VERÐUR VÍÐARI

Fæst undirtøka fyri tilmælinum, er ætlan gjørd fyri, hvussu arbeiðast skal víðari við at betra um útbúgvingar og útbúgvingartilgongdina á merkantila økinum.

- Fokusbólkar - Í fyrstu atløgu er ætlanin at skipa fyri nøkrum fokusbólkum innan hvørja útbúgving sær. Bólkarnir skulu umboða fyritøkur, útbúgvingarstovnar og stovnar, ið kenna mest til avbjóðingarnar og hava flest royndir á økinum. Talan verður ikki um stórar bólkar, men umboðandi bólkar. Innan almenna fyrisiting er longu eitt ávíst arbeiði gjørt við hoyringarumfarð og tí er ikki víst, at neyðugt verður við fokusbólki á tí økinum. Við útgangsstøði í hesum fokusbólkum vera lærugreinar, førleikamál og útbúgvingarbygnaður endurskoðað. Grundarlagið undir fokusbólkunum eru áðurnevndu semjur. Harumframt verður hugt eftir rákinum á økinum í øðrum viðkomandi londum. Arbeiðsbólkurin umrøður niðurstøðurnar og kemur ásamt um innihald.
- Innihald. Í øðrum lagi verður kannað ítøkiliga hvørjir møguleikarnir eru og møgulig ivamál vera avgreidd, t.d. um til ber at skipa fyri samanhangandi skúlagongd og hvørjar lærugreinar til ber at bjóða út.
- Í triðja lagi skulu kunngerðartillagingar og uppskot gerast og sendast til hoyringar og samtyktar hjá viðkomandi pørtum.
- Í fjórða lagi kunnu námsskipanir tillagast og gerast. Fakfólk veita ráðgeving í arbeiðinum at gera námsskipanararbeiði og ítøkiligu lærugreinabroytingarnar.
- Endurskoðaðu útbúgvingarnar og skúlagongdin kunnu í fyrsta lagi fara ígongd á heystið 2019.

# 7 EUX

## 7.1 HVAT ER EIN EUX ÚTBÚGVING

EUX er ein útbúgving, sum bæði er handalig og gymnasial. Tað vil siga, at lærlingur, eftir lokna útbúgving, hevur eitt sveinabræv innan handverk og eitt gymnasialt prógv, svarandi til eitt HF prógv.

Hendan samansetingin letur upp fyri fleiri møguleikum enn verandi lærlingaskipan. Lærlingurin kann, eftir lokna útbúgving, arbeiða sum sveinur á lærueplássinum ella søkja inn á hægri lærustovnar til víðari lestur, so sum verkfrøði, maskinmeistara, arkitekt v.m.

## 7.2 BYGNAÐURIN Í VERANDI LÆRLINGASKIPAN

Verandi lærlingaskipan er 55 vikur í skúla og 133 vikur á læruplássi.

**Býtið ímillum læru og skúla við verandi lærlingaskipan** Mynd 9

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lærupláss | YN1/ 1. skúlaskeið 20 vikur | Lærupláss | YN2/ 2. skúlaskeið 20 vikur | Lærupláss | YN3/ 3. skúlaskeið 10 vikur | Lærupláss | **Sveinaroynd 5 vikur** |

Kelda: Illustratión frá Glasi

Umframt yrkislærugreinar, tekur ein lærlingur, eftir verandi lærlingaskipan, 4 kravdar lærugreinar á E stigi og 1 vallærugrein á D ella E stigi á 2. skúlaskeiði.

## 7.3 BYGNAÐURIN Í EUX LÆRLINGASKIPANINI

Ein EUX útbúgving tekur ímillum 4 ár og 9 mánaðir og 5 ár. Skúlagongdin er 100 vikur og tíðin á læruplássinum er ímillum 127 og 133 vikur.

**Býtið millum læru og skúla við einum tekniskum EUX (dømi innan el, maskin, smiðju, timbur og bil)** Mynd 10

| aug | jan | aug | jan | aug | jan | aug | jan | aug | mar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2019 | 2020 | | 2021 | | 2022 | | 2023 | | 2024 |
| 1. árið | | 2. árið | | 3. árið | | 4. árið | | + 9 mðr | |
| 40 vikur í skúla | | Lærupláss | | 20 v. í skúla | Lærupláss | 20 v. í skúla | Lærupláss | 20 v. í skúla | Lærupláss |

Kelda: Glasir

Ein EUX lærlingur tekur 2 lærugreinar á A stigi og 3 á B stigi, umframt ávísar á C stigi. Harumframt tekur EUX´arin tær yrkislærugreinar, vit kenna frá verandi lærlingaskipan.

Umframt EUX útbúgving innan tekniska økið mæla vit til eina EUX útbúgving innan kreativa økið. Hetta økið fevnir um lærlingar innan hárfríðkan og innan klædna- og tilvirkisatstøði.

Klædnaatstøði og tilvirkisatstøði er í dag ein 2 ára skúlaútbúgving, har dentur verður lagdur á at sniðgeva og tilvirka, serliga úr føroyska tilfeinginum, so sum ull, fiskaskræðu o.ø. Hesar útbúgvingar hava við verandi skipan 5 almennar lærugreinar á C stigi.

Okkara tilmæli er, at útbúgvingarnar gerast til 3 ára breytir ístaðin, har almennu lærugreinarnar kunnu lesast á A, B, og C stigi. Hetta fer at gera tað møguligt at fara til víðari lestur innan ymisk økir.

Fyri at lærlingar innan hárfríðkan skulu hava møguleika at velja ein EUX inngang er neyðugt, at hesi samlesa við klædna- og tilvirkisútbúgvingarnar. Hesi lesa allar almennar lærugreinar saman tað fyrsta árið, og í mest møguligan mun tað seinna árið, umframt nakað av yrkisrættaðum lærugreinum.

Niðanfyri eru dømi um skipanina innan kreativa økið - legg til merkis, at tvey ymisk dømi eru fyri hárfríðkan.

**Býtið millum læru og skúla við einum kreativum EUX** Mynd 11

| aug | jan | aug | jan | aug | jan | aug | jan | aug | mar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2019 | 2020 | | 2021 | | 2022 | | 2023 | | 2024 |
| 1. árið | | 2. árið | | 3. árið | | 4. árið | | + 9 mðr | |
| 40 vikur (hár) | | LP | 28 vikur (hár) | LP | 28 vikur (hár) | Lærupláss | | 4 vikur (SR) | Lærupláss |
| 40 vikur (hár) | | LP | 36 vikur (hár) | LP | 20 vikur (hár) | Lærupláss | | 4 vikur (SR) | Lærupláss |
| 40 v. (klædna og tilvirki) | | 40 v. (klædna og tilvirki) | | 40 v. (klædna og tilvirki) | | | | | |

Viðm.: SR=Sveinaroynd
Kelda: Glasir

Tær gymnasialu lærugreinarnar á A, B og C stigi verða lisnar við uml. 20% færri tímum, enn vit kenna frá verandi gymnasialu skipanini. Hesi 20% verða lisin í yrkislærugreinunum ella á læruplássinum, sum lærlingurin er tengdur at.

Skúlagongdin verður 100 vikur, har 1. skúlaskeið er 40 vikur. Eftirfylgjandi eru 3 skeið á 20 vikur.

## 7.4 MÁLBÓLKURIN

Kravið til ein EUX lærling er rættliga stórt. Eitt nú skal lærlingurin verða sera væl fyri í bókligum lærugreinum, eins og handaligu evnini skulu verða góð.

EUX eru fyri næmingarnar, sum eru væl fyri handaliga og bókliga og sum ynskja yrkisvegin, samstundis sum tey møguliga ynskja at fara víðari í útbúgvingarskipanini. Tey seinastu árini hava fleiri dømi verið um, at næmingar velja at fara í læru ella taka eina útbúgving innan handverk eftir lokna miðnámsútbúgving og umvent. Av tí at EUX er ein samanseting av einari yrkisútbúgving og einari gymnasialari útbúgving, er málbólkurin m.a. hesi. Eitt nú hava umleið 40% av næmingum innan tilvirkis- og klædnaatstøði eina gymnasiala útbúgving frammanundan. Umleið 30% av teimum, ið søkja inn sum hárfríðkarar hava gymnasialt prógv.

Vit síggja eisini, at frisørar javnan lesa til námsfrøðing ella til lærara eftir nøkur ár í frisørvinnuni. Hetta gera tær via eina HF/fyrireikingarbreyt próvtøku.

## 7.5 UPPTØKA AV EUX LÆRLINGUM

Næmingar, sum ynskja eina EUX útbúgving skulu søkja um upptøku í seinasta lagi 15. mars - og skal EUX standa sum valmøguleiki í umsóknarblaðnum, eins og aðrar yrkisútbúgvingar. Upptøkunevnd, við umboðum frá vinnuni og skúlanum, verður sett. Upptøkan fer fram eftir at umsóknarfreistin til miðnám er lokin. Upptøkuleisturin verður fylgjandi:

- Upptøkunevndin hyggur at próvtølum úr 9./10.flokki
- Upptøkunevndin hevur samrøðu við skikkaðar umsøkjarar
- Upptøkunevnd tekur skikkaðar umsøkjarar upp og undirskrivar sáttmála við lærupláss. T.v.s. at upptiknir umsøkjarar hava lærupláss, áðrenn summarfrítíðin byrjar

- Royndartíðin fyri lærling og læruplass er 6 mánaðir

## 7.6 YRKI SUM BYRJA EUX

Mælt verður til, at teknisku yrkini innan el, timbur, maskin, smið og bil verða royndarkoyrd.

Eisini mæla vit til, at verandi klædna- og tilvirkisatstøðisútbúgvingar fara úr 2 til eina 3 ára gongd, har gymnasiali parturin fer úr 5 C stigum til eina HF líknandi útbúgving (2 A stig og 3 B stig og nøkur C stig) við einum kreativum profili. Saman við klædna- og tilvirkisatstøðingum mæla vit til, at hárfríðkarar eisini kunnu velja EUX. Hárfríðkarar taka almennar lærugreinar saman við klædna- og tilvirkisatstøðingum tað fyrsta árið, og í mest møguligan mun tað seinna árið.

**Felags-, breyta- og vallærugreinir**

Fylgjandi lærugreinar og stig skulu bjóðast út:

- 2 A-stig og 3 B-stig
- Útbúgvingartíðin skal liggja millum 1625 og 1760 tímar, sum tó kann styttast við upp til 25%, um skúlin metir, at førleikamálini kunnu røkkast í øðrum virksemi á útbúgvingunum, t.d. í yrkislærugreinunum ella úti á læruplássinum

**Felagslærugreinir** eru: føroyskt A, enskt B, støddfrøði C, samfelagsfrøði C, informatik C og evnafrøði C.

Breyta- og vallærugreinar innan **tekniska økið** (el, timbur, maskin, smið og bil) eru hesar: Tøkni A[5], (bygging og orka) støddfrøði B, alisfrøði B og vallærugreinar (200-300 tímar).

Breyta- og vallærugreinar innan **kreativa økið** (hárfríðkan, klædna- og tilvirkisatstøði) eru: Tøkni A, (design) sølubúskapur B, design B, sálarfrøði C og vallærugreinar (70 til 200 tímar).

Fyri tekniska og kreativa økið eru felags almennu lærugreinar sum áður nevnt. Hetta tímatal er umleið 980 undirvísingartímar. Fyri breyta- og vallærugreinarnar er samlaða talið áleið 700 tímar fyri tekniska økið og áleið 800 tímar fyri kreativa økið. Innan yrkislærugreinar verður mett, at umleið helvtin kann samlesast við aðrar flokkar á skúlunum. Hetta merkir at EUX lærlingar verða skemalagdir á verkstøðum saman við øðrum lærlingum umleið helvtina av tíðini.

## 7.7 BÓLKUR

- Magni á Lakjuni, Glasir, skrivari
- Palli Djurhuus, Føroya Handverkarafelag
- Páll Isholm, Miðnám á Kambsdali
- Bogi Bech Jensen, Glasir
- Magnus Magnussen, Føroya Handverksmeistarafelag
- Marius Thomassen, Føroya Handverksmeistarafelag
- Jørgin Vágslíð, Tekniski skúlin í Klaksvík
- Randi Frederiksberg, Yrkisdepilin, eygleiðari

---

[5] Av tí at tøkni A er lærugrein, sum liggur tætt at yrkislærugreinum og tískil kann samlesast í stóran mun, er góður møguleiki fyri, at aðrar vallærugreinar kunnu lyftast á A stig, t.d. støddfrøði. Hetta hevur við sæ,r at EUX lærlingurin kann fáa 3 lærugreinar á A stigi og tískil fáa enn fleiri møguleikar til framhaldandi lestur.

## 7.8 KOSTNAÐARMETING[6]

**Kostnaðarmeting fyri at byrja tvær EUX-linur sæð 4 ár fram í tíð** — Talva 4

| Økið | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tekniska alm+yrk+felagsl. | 515.000 | 1.220.000 | 1.650.000 | 2.860.000 | 3.100.000 |
| Kreativa alm+yrk+felagsl. | 460.000 | 1.000.000 | 1.300.000 | 1.700.000 | 1.700.000 |
| **Samlaður kostnaður** | **975.000** | **2.220.000** | **2.950.000** | **4.560.000** | **4.800.000** |

Kelda: Glasir

## 7.9 TILMÆLI

Mælt verður til, at tveir EUX flokkar verða tiknir inn á Glasir – ein á tekniska økinum og ein á kreativa økinum, í einari roynd at fáa EUX bjóðað út í Føroyum.

Mælt verður eisini til at bjóða út EUX á Tekniska skúla í Klaksvík.

Um tikið verður upp einaferð um árið fyri tekniska økið, vil upptøkan síggja út sum niðanfyri[7].

**Dømi um skúlagongd, um tikið verður upp einaferð um árið** — Mynd 12

| aug | jan | aug | jan | aug | jan | aug | jan | aug | mar/jun |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2019 | 2020 | | 2021 | | 2022 | | 2023 | | 2024 |
| 1. skeið (40 vikur) | | | | 2. sk. (20 v) | | 3. sk. (20 v) | | 4. sk. (20 v.) | |
| | | 1. skeið (40 vikur) | | | | 2. sk. (20 v) | | 3. sk. (20 v) | |
| | | | | 1. skeið (40 vikur) | | | | 2. sk. (20 v) | |
| | | | | | | 1. skeið (40 vikur) | | | |
| | | | | | | | | 1. skeið (40 vikur) | |

Viðm.: Sveinaroyndin verður tikin í 4. skúlaskeiði

Kelda: Glasir

Um tikið verður upp á hvørjum ári innan kreativa økið, vil upptøkan síggja út sum í myndini niðanfyri (13), um støði verður tikið í ljósabláa leistinum innan hárfríðkan (saman við klædna- og tilvirkisbreytunum) í mynd 11.

---

[6] Kostnaðurin skal ikki síggjast sum ein beinleiðis meirútreiðsla fyri skúlarnar áljóðandi fulla upphædd hvørt ár. Ein EUX-breyt/-útbúgving vil helst flyta næmingar frá øðrum breytum – eitt nú náttúrubreyt. Um hugt verður at kostnaðarmetingini á 4,8 mio fyri 2023, so kann væntast, at flokkatalið á øðrum breytum lækkar sum ein avleiðing av EUX'inum og tí minka útreiðslurnar á teimum breytunum. Við vissu kann sigast, at ein EUX flokkur (bæði innan tekniska og kreativa økið) er bíligari enn ein gymnasialur flokkur.

[7] Dømi: Um 18 lærlingar byrja innan tekniska økið pr. ár, vil hetta geva 72 lærlingar, sum eru í skúla í 2023.

## Dømi um skúlagongd, um tikið verður upp einaferð um árið til ein kreativan EUX

Mynd 13

| aug | jan | aug | jan | aug | jan | aug | jan | aug | mar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2019 | 2020 | | 2021 | | 2022 | | 2023 | | 2024 |
| 1. skeið (40 vikur) | | 2. skeið (36 vikur) | | | 3. sk. (20v) | | | | 4. sk. (4 v.) |
| | | 1. skeið (40 vikur) | | 2. skeið (36 vikur) | | | 3. sk. (20v) | | |
| | | | | 1. skeið (40 vikur) | | 2. skeið (36 vikur) | | | 3. sk. (20v) |
| | | | | | | 1. skeið (40 vikur) | | 2. skeið (36 vikur) | |

Viðm.: Sveinaroyndin verður tikin í 4. skúlaskeiði

Kelda: Glasir

# 8 LÆRLINGASKIPANIN

## 8.1 STØÐAN Í DAG

Sum greitt frá omanfyri, eru inngongdirnar til eina yrkisútbúgving í dag tvær:

- at undirskriva lærusáttmála við arbeiðsgevara, byrja í læru og síðan fara í YN1, tá skúlin innkallar lærlingin
- at søkja inn á YN1 (20 vikur) og um næmingurin fær lærusáttmála hetta tíðarskeiðið, verður hann lærlingur og fer á læruplássið ímillum YN1 og YN2. Fær næmingurin onki lærupláss, ber til at halda fram við skúlagongdini á YN2 (20 vikur) og framhaldandi royna at fáa sáttmála. Fær næmingurin framhaldandi ikki sáttmála, slepst ikki víðari á yrkisútbúgvingarleiðini tá YN2 er lokið.

**Skúlagongdin í dag** Mynd 14




Kelda: Egin uppseting

Leisturin omanfyri varð tikin í brúk eftir broytingina, sum Mentamálaráðið framdi í 2013. Áðrenn tað líktist skúlaskipanin tí skipanini, sum er skotin upp niðanfyri, har bert YN1 var á 20 vikur, ímeðan seinnu skeiðini vóru fleiri í tali og tí styttri.

Eftir leistinum omanfyri, koma lærlingar og næmingar uttan sáttmála at fylgja somu skúlaskeiðum. Hetta er í lagi á YN1, men á YN2 hava lærlingar verið úti á læruplássinum í upp til eitt ár og koma aftur á skúlabonk saman við ungum, sum ikki hava verið úti og arbeitt. Hetta er til ampa fyri bæði næmingin, sum er verri fyri fakliga enn lærlingurin og fyri lærlingin, sum skal ígjøgnum eina skúlagongd á einum støði, sum er ov lágt.

Fyri arbeiðsgevarar merkja longu skúlaskeiðini, at ringt er at planleggja uppgávur, tí partur av arbeiðsmegini er burtur í langa tíð. Harafturat er upptøka á YN1 og YN2 bert eina ferð árliga, í august mánaði. Hevur ein arbeiðsgevari nógvar lærlingar, skulu teir allir í skúla samstundis, líka mikið hvussu leingi lærlingurin hevur lært.

Orsøkin til broytingina í 2013 var, at tað skuldi verða møguligt við samlestri ímillum tey, sum ongan sáttmála høvdu á YN2 og lærlingarnar.

Politiskt ynski er nú um, at avtala verður gjørd um eitt støðugari lærlingatal. Verður avtalan gjørd, ber til at laga lærlingaskipanina til, so hon verður ein rein lærlingaskipan. Ein slík smidlig skipan hevði eisini gjørt sítt til, at tað varð høgligari hjá læruplássunum at taka fleiri lærlingar.

**Skúlagongdin mælt verður til (dømi)** Mynd 15




Kelda: Egin uppseting

## 8.2 FRÁFALL

Sum sæst á myndini niðanfyri, er fráfallið av lærlingum ov stórt. Árini 2006-17 hevur tað ligið ímillum 8% og 42% og í miðal liggur fráfallið omanfyri 30%.

**Býtið millum fráfall og tey sum hava staðið sveinaroyndina** Mynd 16




Kelda: Yrkisdepilin

Myndin niðanfyri vísir munin á nýggjum sáttmálum og sveinabrøvum. Her sæst, at sum heild er rættiliga stórur munur á, uttan at í 2009 og 2010 vórðu fleiri sveinabrøv útskrivað, enn tað vórðu nýggir sáttmálar undirskrivaðir. Hetta allar helst tí nógvar fyritøkur høvdu lítið at gera hetta tíðarskeiðið og ikki tóku inn nýggjar lærlingar, ímeðan lærlingarnir, sum vóru komnir inn í góðu tíðunum, gjørdist lidnir hesi árini.

**Nýggir lærusáttmálar og sveinabrøv árini 2003 til 2017** Mynd 17




Kelda: Yrkisdepilin

Myndirnar omanfyri vísa, at fráfallið ímillum lærlingar er rættiliga stórt, hóast tað er lægri enn eitt nú í Danmark. Orsøkirnar til fráfallið eru ikki kannaðar og tær eru helst fleiri. Skúlarnir meta tó, at ein orsøk kann vera, at nógvir næmingar ikki kenna nógv til yrkisleiðina áðrenn teir søkja læruupláss. Fyrr lærdu ung nakað av handverki heima, meðan tað í dag eru nógv heim, har ung als onki tilknýti hava til tað handverksliga. Partur av teimum ungu velur leið, tá tey koma úr fólkaskúlanum, at fleiri teirra vita at tey ikki ynskja at fara gymnasiala vegin, uttan tó at hava serliga vitan um yrkisútbúgvingar. Hóast tað, skal ein sum ynskir at fáa yrkisútbúgving, velja sær yrki, áðrenn hann fer í læru/skúla. Hildið verður, at um eitt støðishálvár varð upprættað, har ung høvdu møguleika at royna ymisk yrki ígjøgnum eitt

tíðarskeið, vildi tað økt um kunnleikan til ymisku yrkisleiðirnar, eins og tað vildi betra um avgerðargrundarlagið, tá valið av faki skuldi takast. Á tann hátt kann eitt slíkt støðishálvár verða við til at minka um fráfallið, sum stendst av manglandi innliti.

Sigast kann eisini, at við tað at handverk eftir 6. Flokk ikki longur er ein partur av flestu fólkaskúlunum, eins og nógv heim onki tilknýti hava til handverk, so verður eitt slíkt hálvt støðisár við til at geva ungum ein góðan førning á hesum økinum, hóast tey skuldu valt sær aðra lívsleið.

**Yvirlit yvir uppskot til nýggja lærlingaskipan** Mynd 18




Kelda: Egin uppseting

## 8.3 BÓLKUR

- Atli Feilberg Hansen, TSK, skrivari
- Suni Simonsen, Føroya Handverkarafelag
- Benny Nielsen, Glasir
- Dávur Høgnason, Føroya Handverksmeistarafelag
- Petur Frank Joensen, Føroya Handverksmeistarafelag
- Sjúrður Sólstein, TSK
- Randi Frederiksberg, Yrkisdepilin, eygleiðari

## 8.4 TILMÆLI

- Eitt støðishálvár eigur at verða boðið út til teirra, sum ikki hava sáttmála
- YN2 eigur at verða stytt:
    - Einstøku yrkini arbeiða víðari við stytting av skúlaskeiðunum
- Allar námsætlanir eiga at verða gjørdar av nýggjum og tillagaðar til einstøku yrkini
- Hvørt yrki sær eigur at hava egna námsætlan
- Almennu fakini eiga øll at verða yrkisrættað, eins og endurskoðað verður, um fakini eru júst tey røttu
    - Førleikamálini í almennu fakunum skulu øll endurspegla yrkið tey hoyra til. MMR/Yrkisnevndin eigur at taka stig til, at arbeiðið við námsætlanum og lesiætlanum verður gjørt av skúla og fakfólki í felag
- Upptøka til yrkisnámini (YN) verður tvær ferðir árliga, í tann mun næmingagrundarlagið uppfyllir treytirnar til minstamark

## 8.5 KOSTNAÐARMETING

**Fíggjarligar avleiðingar av einum støðishálvári:** Eitt skúlaskeið á 20 vikur kostar 420.000 kr. Roknað verður við 3 flokkum á Tekniska skúla í Klaksvík og 4 flokkum á Glasi: 7[8] flokkar x 420.000 kr. = 2.940.000 kr.

Hesar útrokningar eru beinleiðis útreiðslur av, at næmingar ganga 20 vikur á fyrireikingarbreyt. Hesar vikurnar telja ikki við í lærutíðini.

**Fíggjarligar avleiðingar av stytting av skúlaskeiðum:** Tað verður ikki mett at styttingin av skúlaskeiðunum kemur at hava við sær ein meirkostnað, við tað at vikukostnaðurin er tann sami og samlaða longdin á skúlagongdini er óbroytt.

## 8.6 ÚRSLIT AV BROYTINGINI

- Næmingafráfallið verður minni í teimum ymisku yrkjunum, við tað at næmingar hava betri møguleika at velja rætt fyrstu ferð
- Næmingar fáa møguleika at seta seg inn í, hvat yrki teimum dáma
- Nógvir lærlingar eru skúlatroyttir og úrtøkan av teimum longu skúlaskeiðunum minkar tí
- Fyritøkur hava betri møguleika at planleggja arbeiði og tilgongd av lærlingum
- Góðskan í frálæruni verður munandi betri, miðvís og konkret

Tryggjast skal, at góðskan og støðið á lærlingaútbúgvingini ikki lækkar sum úrslit av teimum broytingunum mælt verður til. Krøvini til føroysk sveinabrøv skulu lúka somu treytir sum krøvini til sveinabrøvini í okkara grannalondum.

[8] Tíðirnar eru góðar og tí er størsti parturin av teimum, sum koma inn á skúla í dag, lærlingar. Metta flokkatalið til støðishálvárið er tí rættiliga lágt. Hugsast kann, at í verri tíðum økist talið av umsøkjarum, sum ikki hava sáttmála og tá vil flokkatalið til støðishálvárið væntandi økjast.

# 9 KUNNING UM YRKISÚTBÚGVINGAR

Um hugt verður at, hvussu nógvir sáttmálar eru undirskrivaðir frá 2003 fram til í dag og tað verður samanborið við støddina á árgangum av teimum, sum eru 17 ár, sæst, at í miðal yvir hesi árini, hava 36% av hvørjum árgangi undirskrivað sáttmála, eins og alt fleiri velja yrkisútbúgvingarvegin, so at lutfallið er hækkandi. Í Føroyum hava vit tí sum heild ikki trupulleikar við at fáa útbúgvið sveinar. Tó so, er fráfallið av lærlingum ov høgt (sí p. 28).

Endamálið við kunningini er tí ikki at fáa fleiri ung at velja yrkisútbúgvingarvegin, men heldur at valið av einari handaligari yrkisleið er eitt tilvitað val, heldur enn eitt frával av einari bókligari leið. Mett verður, at um tilvitanin um, hvat yrkisleiðin inniber gerst betri og útbúgvingarvali tí gerst betur grundað, fer hetta eisini at ávirka fráfallið av lærlingum, sum við einum miðal á yvir 30% er ov høgt.

**Lærlingaupptøkur í mun til 17 ára aldurbólkin árini 2003 til 2017** Mynd 19




Kelda: Hagstova Føroya og Yrkisdepilin

## 9.1 BÓLKUR

- Marius Thomassen, skrivari
- Mariann Norðoy, TSK
- Heðin Lamhauge, Glasir
- Tina Purkhús, fólkaskúlin
- Nina Brockie, fólkaskúlin
- Randi Frederiksberg, eygleiðari

## 9.2 BÓLKURIN HEVUR VIÐGJØRT

- Hvørji kunningar- og marknaðarføringsátøk til frama fyri yrkisútbúgvingum eru í dag
- Hvussu kunnu hesi skipast?
- Skulu nøkur burtur?
- Skulu onnur átøk leggjast afturat?
- Hvørjum skal man røkka?

## 9.3 HVØRJI MARKNAÐARFØRINGSÁTØK TIL FRAMA FYRI YRKSIÚTBÚGVINGAR ERU Í DAG

- Greið frá tínum yrki
- FM fyri handverkslærlingar
- Rokniheftir til 8. flokk
- Skúlavitjanir á byggiplássum
- Starvsvenjing í framhaldsdeildini
- Handverk og list í fólkaskúlanum
- Les & lær
- Kunning frá yrkisskúlunum
- Kunning frá Mentamálaráðnum - faldari
- NámX

## 9.4 NØKUR TILMÆLI

- Vegleiðararnir í teknisku skúlunum kunnu hava tiltak fyri vegleiðarum í fólkaskúlunum.
- Eiga at hava eina spennandi heimasíðu at vísa á.
- Bólkurin metir, at MMR eigur at gera størri íløgur í les.fo
- Meira handverk eigur at vera boðið út í frá 7. – 10. flokk
- Eftirmeta skúlatilfar
- Vinnan og/ella teknisku skúlarnir eiga at hava eitt tilboð um upplegg fyri felagnum Heim og skúli
- Skipa átøkini betur – ger ein kalendara

## 9.5 DØMI UM KALENDARA

- 7. flokkur:
    - Yrkisskúlarnir vitja 7. flokkar áðrenn val av vallærugreinum
    - Byrja fakið handverk
    - Skúlavitjanir á byggiplássum; arbeiða við temaheftinum – apríl/mai
- 8. flokkur:
    - Halda fram við fakinum handverk
    - Greið frá tínum yrki – oktober
    - Rokniheftið – januar til mars
    - FM fyri handverkslærlingar – februar/mars
- 9. flokkur:
    - Teknisku skúlarnir kunna um útbúgvingarmøguleikar
    - Til próvtøku í fakinum handverk

## 9.6 NIÐURSTØÐA

Bólkurin metir, at tað er avgerandi fyri val av útbúgving, at fólkaskúlanæmingar eisini læra á praktiskan hátt ígjøgnum allan fólkaskúlan; eisini í framhaldsdeildini. Handverk umboðar fakini, sum børnunum dáma allarbest. Tí eiga tey at hava rætt til at uppliva handverksfakini sum eins týdningarmiklar yrkisleiðir og tær bókligu, sum í dag eru ráðandi í fólkaskúlanum.

# 10 HVØR ER VINNINGURIN AV AT BROYTA YRKISÚTBÚGVINGARSKIPANINA?

- Nakrar av broytingunum hava við sær eina kostnaðarøking, men hevur tað við sær, at fleiri ung velja yrkisútbúgvingarvegin, er møguliga talan um eina sparing, tí yrkisútbúgvingarnar, við 55 vikum í skúlagongd, eru munandi lættari í rakstri fíggjarliga enn gymnasialu útbúgvingarnar.
- Sagt hevur verið, at ber til at fáa javnari lærlingatal, kann skúlaskipanin, sum ikki stuðlar undir lærupartin, takast burtur. Tað er sæð úr hesum sjónarhorninum, at ynski er um, at 35 av teimum tilsamans 55 skúlavikunum í lærutíðini verða liðaðar sundur í styttri skúlaskeið, tilpassa yrkjunum. Hetta fer at gera skúlapartin meira liðiligan, so at serliga smærru læruplássini lættari kunnu leggja til rættis arbeiðsgongdir og uppgávur. Eisini fer hetta at økja um úrtøkuna fyri lærlingin, sum fer at fáa størri úrtøku av skúlaskeiðunum. Menningin innan ymisku fakini gongur í summum førum skjótt, eins og tað kemur fyri at handverkarar, ið hava verið burtur frá fakinum, byrja aftur. Tí er ein tørvur millum handverkarar at fáa frálæru av nýggjum innan ymisk øki. Við at skeiðið gerast styttri og í størri mun tematiserað, kann væntast, at sveinar eisini fara at brúka møguleikan at ynskja at koma á skeiðini. Hetta kundi verið skipað soleiðis, at møguleiki skuldi verið fyri at luttikið á ymsu skeiðunum við at gjalda fyri luttøkuna.
- Yrkisútbúgvingarnar gerast enn betri. Tær fara at geva ungum grundleggjandi vitan og kunnleika um handverk, nú nógv heim ikki hava hesa upplæring, eina basala innføring í handverk, sum tey fara at hava gleði av ígjøgnum lívið, hóast tey velja aðra yrkisleið. Eisini fer hon at geva teimum innføring í, hvat ein yrkisútbúgving er og ein møguleika fyri at ”snodda” til fleiri yrkir, so endaliga valið er væl umhugsað. Hetta skuldi bøtt um fráfallið, sum í dag sær út til at verða høgt – yvir 30% pr. ár á yrkisútbúgvingunum ímillum tey sum hava sáttmála. Og skuldi tað gjørt yrkisútbúgvingarnar meira attraktivar fyri tey ungu, so loysir tað eina avbjóðing við, at fleiri velja yrkisútbúgvingarvegin. Tað gagnar samfelagnum, eins og tað í longdini vil spara landinum pening, sum kann verða brúktur til aðrar útbúgvingar, tí ein lærlingur kostar væl minni enn ein studentaskúlanæmingur.
- Broytingarnar føra við sær, at útbúgvingarnar verða nútímansgjørdar og at útbúgvingargóðskan hækkar. At hava tvinnar møguleikar í lærlingaskipanini má metast at vera ein styrki, bæði fyri handverksvinnuna og vinnu har hægri útbúgvingar er krav. Væntast kann, at yrkisútbúgvingarnar gerast meira lokkandi hjá einum breiðari hópi av ungum, sum ynskja at fara yrkisrættaða vegin.
- Tillagingin í skúlaskeiðunum fer væntandi at økja um bæði trivnaðin og úrtøkuna hjá lærlingunum ígjøgnum skúlagongdina, eins og virkir fara at hava lættari við at taka lærlingar.

YRKIS depilin